Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 13. januar 2006



**Søgunnar stóru flýggjanir**

DR2

Alcatraz var upprunaliga eitt fort, sum varð at verja San Fransisco móti álopum. Í 1907 varð oyggin tó umbygd til fongsul. Eitt fongsul, har menn sum Al Capone og George "Machine-gun" Kelly vórðu fongslaðir. Sambært mytuni, so kundi eingin maður nakran tíð flýggja av the Rock livandi. Men nakrar royndir eru tó gjørdar.

**Mánadagin kl. 19.00**





**Slóðarar 1:3 - Oddfríður Gregersen**

svf

Vit senda í kvøld fyrstu av trimum støkum sendingum um undangongumenn innan føroyska fiskivinnu og ídnað í seinnu helvt av farnu øld. Í fyrstu sendingini hitta vit Oddfríð Gregersen í Gøtu, sum greiðir frá lívi sínum frá barnsbeini til dagin í dag. Í meira enn 35 ár stóð hann á odda fyri Fiskavirkinum í Gøtu. Hann hevur eisini verið formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag og bygdarráðsformaður í Gøtu kommunu. Sum ungur sigldi hann úti við donskum skúlaskipum, áðrenn hann vendi heimaftur og fór at arbeiða hjá verfaðirinum í Fuglafirði. Fyrst í seksti-árunum tók hann við sum stjóri á Fiskavirkinum eftir pápa sín. Leivur Hansen leggur til rættis.

**Sunnudagin kl. 20.00**

**Assassination Tango**

CANAL+ FILM1

Ein hálvgamal leigudrápsmaður verður sendur til Argentina at drepa ein herovasta. Daman hjá leigudrápsmanninum ánar ikki, hvat hann tekst við, og letur hann tí fara. Men í Bouenos Aires hittir hann tó eina tølandi vakra kvinnu. Hon vekir áhuga hansara fyri tango, og so eru allar drápsætlanir gloymdar.

**Fríggjadagin kl. 20.00**

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**